**Avgerð**

**tikin hin 27/6-2019**

**Málstal: 19/00103**

Fiskimálaráðið

móti

Norðlýsinum

**Samandráttur:**

Fiskimálaráðið hevur kært, at Norðlýsið í grein leggur landsstýrismannin í Fiskivinnumálum undir at hava givið undantaksloyvi uttan lógarheimild og eisini at hava lagt umsitingina í Fiskimálaráðnum undir at hava váttað fyri hesum.

Til viðgerð av hesum málinum varð nevndin mannað við formanninum Jan Sjóstein, og nevndarlimunum Marjun Dalsgaard, Ingrid Bjarnastein og Onnu Paulinu Leo Olsen.

**Fjølmiðlanevndin**

Fiskimálaráðið hevur við kæru, dagfest 19. mars 2019, kært Norðlýsið í sambandi við grein hjá Norðlýsinum um menningarkvotur, dagfest 18. mars 2019.

Í sambandi við upplýsingina av málinum, og samskiftinum millum partarnar annars, verður m.a. víst á Landsstýrismannin í Fiskivinnumálum, Fiskimálaráðið og umsitingina í Fiskimálaráðnum. Í hesi viðgerð hevur nevndin valt sum meginreglu at viðgera hesi undir einum sum Fiskimálaráðið, hetta tá tað ikki er serliga neyðugt at eyðmerkja meira nágreiniliga.

Kærarin vísir á, at Norðlýsið í grein síni í yvirskriftini av órøttum leggur Landsstýrismannin í Fiskivinnumálum undir at hava givið undantaksloyvi uttan lógarheimild til tess, umframt at hava lagt umsitingina í Fiskimálaráðnum undir at hava váttað fyri hesum. Hetta metir kærarin ikki vera rætt, og vísir kærarin á, at Fiskimálaráðið frammanundan hevur gjørt Norðlýsið varugt við hetta.

Í kæruni vísir Fiskimálaráðið á ítøkilig punkt í Leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið, ið Fiskimálaráðið metir, at Norðlýsið hevur brotið. Eisini hava partarnir báðir havt møguleika at gera viðmerkingar hvør til annan, og er tilfarið í málinum sera rúgvumikið, og viðmerkingarnar eru nógvar í tali. Nógvar av viðmerkingunum viðvíkja m.a. fiskivinnu- og vinnupolitikki, fiskivinnulóggávu, løgfrøðiligari ástøði og mannarættindum, ið ikki eru viðurskifti, ið Fjølmiðlanevndin ger niðurstøður viðvíkjandi. Nevndin viðger bert viðurskifti, sum eru mett viðkomandi í mun til metingina um góðan fjølmiðlasið.

Aðalendamálið við leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið, ið byggir á eina javnvág millum at verja einstaklingin og ikki óneyðuga at skerja frælsi hjá miðlunum at virka almenna áhuganum at gagni, eigur allatíðina at vera havt fyri eyga.

Havast skal í huga, at tað einans eru viðurskifti í mun til góðan fjølmiðlasið, ið nevndin tekur støðu til. Tískil eru tulkingar av m.ø. fiskivinnulóggávu, fiskivinnupolitikki, løgfrøðiligari ástøði og mannarættindum ikki partur av avgerðargrundarlagnum hjá nevndini.

Yvirskipað kann sigast, at menningarkvotur eru eitt evni, ið hevur stóran samfelagsligan áhuga. Skrivi-, talu- og framsøgufrælsi hjá fjølmiðlunum er vítt, tá mál av samfelagsligum áhuga vera viðgjørd.

Tvey viðurskifti eru í hesum máli, sum eru viðkomandi fyri metingina av, hvørt talan er um brot á góðan fjølmiðlasið. Yvirskriftin í greinini, ið er soljóðandi *"Landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum hevði onga lógarheimild at geva undantaksloyvi"*, umframt páhaldið um at Fiskimálaráðið skal hava váttað fyri Norðlýsinum, at Landsstýrismaðurin ikki hevði lógarheimild.

Av samskiftinum millum Fiskimálaráðið og Norðlýsið er greitt, at ósemja er um, hvat liggur í hugtakinum lógarheimild. Norðlýsið roknar ikki heimild á óskrivaðum grundarlagi sum eina lógarheimild, men er av tí fatan, at bert tað, sum stendur skrivað í lógarteksti, er lógarheimild. Í svarskrivi fer Norðlýsið so langt, sum at kalla tulking av óskrivaðum reglum fyri neyðrætt; hetta er eyðsæð skeivt. Fiskimálaráðið heldur seg hinvegin til vanliga løgfrøðiliga fatan.

Einki ivamál er um, at yvirskriftin hjá Norðlýsinum byggir á eina skeiva fatan av, hvat ein lógarheimild er í vanligari løgfrøðiligari merking.

Nevndin má tí taka støðu til, um hesin skeivleiki í yvirskriftini er nóg mikið til at geva átalu fyri brot á góðan fjølmiðlasið.

Umsiting av fiskiloyvum og lógargrundarlagið undir hesum avgerðum eru fløkt og torskild evni av stórum samfelagsligum týdningi. Ábyrgdin hjá fjølmiðlinum at verða nærlagdur er í hesum føri so mikið størri.

Norðlýsið skrivar í síni viðgerð av undantaksloyvum, at tað er ógreitt hvussu hesi verða umsitin, og at tað er trupult at vísa á, eftir hvørjum reglum og kriterium avgerðirnar verða tiknar. Norðlýsið metir, at umsitingin ber brá av tilvild, og at manglandi greidleikin í grundarlagnum fyri avgerðunum um undantaksloyvi hevur við sær, at landsstýrismaðurin hevur ov stórt vald til at taka avgerðir, og at trupult er at eftirmeta rættleikan av hesum avgerðum.

Í samskiftinum millum Norðlýsið og Fiskimálaráðið verða hesi viðurskifti umrødd frammanundan almannakunngerðini av greinini. Yvirskriftin hjá Norðlýsinum, at *"Landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum hevði onga lógarheimild at geva undantaksloyvi"* er ikki tráð við tað samskifti, sum hevur verið millum partarnar.

Men í greinini, og tí sum seinni verður skrivað, framgongur tó greitt, at Norðlýsið sipar til manglandi heimild í løgtingslóg, og at blaðið ikki roknar óskrivaðan rætt sum lógarheimild. Hóast hetta eftir vanligari løgfrøðiligari fatan av hugtakinum eyðsæð er skeivt, verður tað í sjálvari greinini gjørt lesaranum greitt, hvønn týdning blaðið leggur í útsøgnina.

Umsiting av fiskiloyvum, og afturtøka á óskrivaðum lógargrundarlagi eru fakliga tórgreidd evni, sum eru serliga avbjóðandi at miðla. Samskifti millum partarnar í hesum máli, har Fiskimálaráðið ómakar sær við at greiða frá løgfrøðilgum ástøði, sum fyri flestu leikfólk helst ikki eru lætt atkomilig, ber eisini brá av hesum.

Nevndin metir, at hóast yvirskriftin er óneyv og ikki í trá við vanliga løgfrøðiliga fatan av hugtakinum lógarheimild, so framgongur tað av greinini, at tað, sum Norðlýsið sipar til, er umsiting á óskrivaðum lógargrundarlagi, og tann ógreidleika hetta hevur við sær. Nevndin metir ikki, at óneyvleikin og ógreidleikin í nýtsluni av einum løgfrøðiligum hugtaki í hesum samanhangi, er nóg mikið til at geva eina átalu fyri brot á góðan fjølmiðlasið. Nevndin hevur í síni meting lagt dent á, at talan er um fakliga torgreidd evni, sum eru avbjóðandi at miðla, og at innihaldið í greinini viðger spurningin um lógargrundarlagið nærri og á ein hátt, sum gevur lesaranum eina betri fatan av, hvat meint verður við. Óneyvleikin og ivasama nýtslan av hugtakinum lógarheimild er tí ikki av slíkum slag, at tað er orsøk til at geva átalu fyri brot á góðan fjølmiðlasið.

Páhaldið hjá Norðlýsinum um, at Fiskimálaráðið hevur váttað fyri, at eingin lógarheimild fyriliggur, er ikki ein loyal endurgeving av sjónarmiðnum hjá Fiskimálaráðnum. Fiskimálaráðið verður við hesum endurgivið fyri annað sjónarmið enn tað, ráðið greitt hevur boðað frá. Tað er í sjávum sær atfinningarsamt. Fiskimálaráðið slapp tó beinvegin til orðanna í greinini, og fekk høvi at vísa á, at lógarheimildin fyrilá á óskrivaðum grundarlagi. Fiskimálaráðið hevur somuleiðis fingið høvi at afturvísa, at tað skal hava váttað fyri, at eingin lógarheimild var.

Fjølmiðlanevndin tekur avgerð í málum, ið viðvíkja brot á góðan fjølmiðlasið og rættinum at svara aftur. Fjølmiðlanevndin kann í avgerð síni vísa sína ónøgd við ein fjølmiðil við t.d. at áleggja honum at almannakunngera avgerð nevndarinnar, bæði um brot á góðan fjølmiðlasið og rættin at koma við aftursvari. Nevndin kann tó eisini gera vart við atfinningarsom viðurskifti, ið hon metir ikki vera í lagi, hóast eitt samlað grundarlag ikki er fyri at geva átalu ella at áleggja almannakunngerð.

Samanumtikið metir nevndin ikki, at tað undir hesum umstøðum er orsøk at geva átalu fyri brot á góðan fjølmiðlasið, og grundarlag er heldur ikki fyri at krevja rætting. Norðlýsið átti tó at havt endurgivið sjónarmið Fiskimálaráðsins loyalt beinanvegin.

**Avgerð**

**Samanumtikið metir Fjølmiðlanevndin ikki, fyriuttan viðmerkingarnar omanfyri, at grundarlag er fyri, at geva Norðlýsinum nærri átalu fyri kærdu greinina um menningarkvotur frá 18. mars 2019.**

**Fjølmiðlanevndin**

f. [signature]

Jan Sjóstein, formaður